# Vanvard skapanarverk

**– Vandin fyri, at lutir, menniskju ella sjálvt øll okkara vistfrøðiliga skipan støkkur sundur, liggur allatíðina og lúrir. Hetta er eisini heilt ítøkiliga treytin, tú arbeiðir undir, tá tú arbeiðir við leirlutum, sigur leirlistakvinnan Guðrið Poulsen, sum hevur gjørt treytina fyri listaverkunum til teirra boðskap. Framsýningin hjá Guðrið í Riberhúsi í Fuglafirðið er opin til 21. juli**

LEIRLIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Guðrið Poulsen og sonurin Poul Johan*

Leirlistaframsýningin »Vanvart« lat upp beint fyri Varmakeldu, og á ferniseringini hevði Guðrið fingið Maritu Nattestad og Jóruna Hansen at syngja og spæla »Eitt dýpi av dýrari tíð« hjá Jens Paula Heinesen.

– Eg valdi hesa yrkingina, tí hon á ein hátt er ein ímynd av tí, eg vil fortelja við framsýningini, sigur Guðrið. Tað er sjálvandi altíð upp til hvønn einstakan, hvønn týdning, tey leggja í míni verk. Men sálarlig skroypiligheit og styrki og tann vanvarda javnvágin har ímillum hava verið frammaliga í huganum hjá mær, meðan eg havi arbeitt við lutunum, sigur Guðrið.

## Gjørd til hølið

Hendan leitanin eftir ella ímyndin av javnvág sæst aftur sum ein reyður tráður bæði í teimum einstøku listaverkunum, samanspælinum teirra millum og enntá millum verkini og hølini tey standa í.

– Framsýningin er gjørd til júst hesi hølini. Eg havi altíð verið óvuliga hugtikin av hølunum í Riberhúsi og serliga mátanum, ljósið streymar gjøgnum hetta rúmið millum vindeyguni, sum venda niðan móti bygdini og oman móti fjørðuni, sigur Guðrið. Tú hevur ikki somu møguleikar at spæla tær við ljósið í sjálvum leirlutinum, sum til dømis í einum málningi. Hinvegin hevur tú heilt aðrar møguleikar at lata ljósið spæla rundanum og ígjøgnum lutin, og teir møguleikarnir eru ein týðandi partur av framsýningini, sum samlað listaverk, sigur Guðrið.

## Korthús ella skansi

Tað er týðiligt, at tað ikki er av tilvild, at listaverkini hjá Guðrið inni í Riberhúsi standa, har teir standa og í eini ávísari hædd. Hvørja ferð tú flytir teg, ella bukkar teg niður, fortelur verkið eina nýggja søgu. Hyggur tú til dømis eitt sindur á skák niður á lutin beint frammanfyri vindeyganum omaneftir, minnir hann kanska mest um ein skansa, sum onki kann órógva. Men bukkar tú teg niður, so ljósið sleppur ígjøgnum, verður skansin til eitt skinklut korthús, sum fer í fillur, bara tú andar á tað. Javnvágin er hárfín, og tú fært eina kitlandi kenslu av, at tað er tú, sum ger av, um hon støkkur sundur ella ikki.

## Tonsatungt pu

Mitt á gólvinum stendur ein stórur, fílabeinshvítur lutur við heitinum »Skroypilig konstruktión«. Her er afturvendandi javnvágin endurgivin í samanrenningini millum stóra, einfalda ytra skapið og fløkjuna av evarska smáum trægrum og prikkum, sum alt er sett saman av. Liturin og skapið fær meg at hugsa um eina beinagrind undir sjóneyku, har ein frumskógur av næstan gjøgnumskygdum trægrum snúgva seg út og inn ímillum hvønnannan. Verkið tykist sum eitt tonsatungt pu, um nakað slíkt er til.

## »Skapanarverk«

Á veggunum hanga myndir úr leiri av smáum verum, sum minna meg um myndir í lívfrøðibókum. Myndirnar av æti kenni eg aftur, men hinar síggja út sum eitthvørt frá eini aðrari gongustjørnu.

– Hetta eru nanosteinrenningar, greiðir Guðrið frá. Eg visti, at olja kemur úr samanantrýstum steinrenningum, so eg spurdi tey á jarðfrøðissavninum, um tey ikki kundu senda mær onkrar myndir. Og knappliga stóð eg við einum heilum undurføgrum heimi av skapum og mynstrum í hondini, púra klárt at brúka.

– Æti og steinrenningar geva eina góða mynd av, hvussu skroypiligt alt skapanarverkið kann vera. Verður javnvágin órógvað, støkkur alt jú sundur, so eg helt tað vera upplagt at brúka vanvarda skapanarverkið í listini, sum jú aftur er eitt skapanarverk – tó uttan at tær nýtist at leggja nakað átrúnaðarligt í tað, sigur Guðrið, sum hevur ognað sínum forfedrum framsýningina »Vanvart«.



*Ljósið spælir ein avgerandi leiklut á framsýningini. Í hesum verkinum verður ein skansi til eitt skinklut korthús, tá ljósið skínur ígjøgnum*



*Í listaverkinum »Skroypilig konstruktión« er Guðrið farin frá tí ytra skapinum og inn í trægraskógin í beinagrindini*



*Nanosteinrenning - upprunin til olju*



# Strandferðslan yvirtikin

Innlendismálaráðið hevur yvirtikið umsitingina av Strandferðsluni frá Vinnumálaráðnum. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, sigur, at tað er við sorgblídni, at hann nú letur umsitingina av Strandferðsluni til Innlendismálaráðið.

Jógvan við Keldu, landsstýrismaður við innlendismálum, er hinvegin fegin um at taka Strandferðsluna undir sína umsiting.

– Framtíðin hjá Strandferðsluni er smáoyggjarnar. Standferðslan skal verða ein tænastuveitari, bæði í luftini og á sjónum, sigur Jógvan við Keldu.

Stjórin í Strandferðsluni, Kristian Davidsen, sigur, at hann bjóðar Innlendismálaráðnum vælkomið at samstarva við Strandferðsluna.

**-hkm**



*Innlendismálaráðið hevur yvirtikið unsitingina av Strandferðsluni. Kristian Davidsen stendur í miðjuni saman við landsstýrismonnunum Jógvan við Keldu og Bjarna Djurholm*

# Ásla Rannvá Svensson listaframsýning

Unga Listakvinnan Ásla Rannvá Svensson úr Havnini hevur listaframsýning á Norðoya Kunningarstova tað sum eftir er av juli mánaði.

Framsýningin letur upp leygardagin 10. juli klokkan 15:00.

Annars er opið hvønn dag í vanligari upp- og afturlatingartíð hjá Kunningarstovuni.

Á framsýningini vera millum 25 og 30 smá og miðalstór listaverk.

Ásla Rannvá hevur áður havt framsýningar í Fuglafirði, í Snarskivuni eins og Várframsýningi og á Ólavsøku í Havn.

# Forsølan til Summar Festivalin er byrjað

Í døgunum frá 12. til 15. august verður Summar Festivalur 2004 hildin í Klaksvík. Hetta er eitt nýtt og stórt tónleikatiltak, sum fer at bjóða tónleik í fýra dagar á rað.

Tað verða bæði føroysk og útlendsk nøvn, sum koma at spæla á festivalinum, og millum nøvnini eru Ken Hensley, Boney M, Frændur, Hanus Johansen, Kjell Samuelson og Gunnar Mikkelsen.

Leygardagin 14. august verður stór útikosert á Vágsbøi mitt í Klaksvík, og har fara nógv av teimum stóru nøvnunum at spæla. Tað ber til at keypa sær atgongumerki til hetta tiltakið í forsølu. Atgongumerkini kosta 250 krónur og fáast á Shell-støðunum kring landið og á Kunningarstovuni í Havn.

Harafturat ber tað eisini til at tryggja sær pláss í KÍ-høllini til stóru gospelkonsertina, sum verður sunnudagin 15. august. Her fara millum annað Kjell Samuelson úr Svøríki og Hans Inge Fagervik úr Noregi at syngja. Eisini føroyskir sangarar og tónleikarar luttaka. Atgongumerki til hesa konsertina kosta 150 krónur í forsølu.

Við at keypa atgongumerki í forsølu ber til at spara pengar og tryggja sær pláss, siga fyrireikararnir.

# Grundarlag er fyri kvinnulistanum

Herfyri kom fram, at arbeitt verður við at gera ein kvinnulista til býráðsvalið í Havn. Arbeitt hevur verið við hesum allatíðina, og seinasta fríggja kvøld skipaðu stigtakararnir fyri fundi, har tikið varð samanum. Eisini varð tosað um, hvussu skal farast fram í heyst.

Sum skilst var fitt av fólki møtt til fundin, og niðurstøðan var, at tað er grundarlag fyri at gera ein kvinnulista. Gjørt varð eisini av, at farast skal undir fyrireikingararbeiðið aftur umleið 20. august.

**- sae -**

# Dansinátt í Norðurlandahúsinum

**Nú verður aftur møguleiki at royna stevið eina løtu leygarkvøldið. Tá verður skipað fyri árligu dansináttini í Norðurlandahúsinum**

FØROYSKUR DANSUR
*Edvard Joensen*



*Árliga dansináttin veðru leygarkvøldið í Norðurlandhúsinum*

Árliga dansináttin, sum Norðurlandahúsið og Sláið Ring skipa fyri, verður hildin í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið.

Í nøkur ár hava Norðurlandahúsið og Sláið Ring, sum er landsfelagið hjá føroysku dansifeløgunum, í felag skipað fyri eini sonevndari dansinátt í Norðurlandahúsinum, har dansað verður til út móti morgni.

Vanligt hevur verið, at eitt av limafeøgunum í Sláið Ring hevur havt ábyrgdina av hesum tiltaki. Tað hevur virkað soleiðis, at fólk frá felagnum hava verið á staðnum og lagt fyri, tá byrjað verður. Síðan hevur dansurin gingið sum vanligt, at tann, sum hug hevur, hevur tikið eina vísu. Hevur so staðið á, hevur tað erið uppgávan hjá vertsfelgnum at fáa dansin at ganga víðari. Í ár verður tað Dansifelagið í Suðruoyar norðaru helvt, sum fer at vera vertsfelag.

Dansináttin byrjar klokkan 22.00 leygarkvøldið og heldur á til klokkan 02.30. Um dansurin gongur væl, kann henda, at hildið verður fram eina løtu afturat, siga fyrireikararnir.

Hesi almennu dansitiltøkini í Norðurlanda-húsinum hava vanliga verið væl vitjað. Nógv fremmand ferðafólk plaga at vera í húsinum til hesi tiltøkini. Hetta er forkunnugt og avgjørt nakað, tey vilja uppliva. Heilt nógv nýta eisini høvið til at fara uppí.

Eisini føroyingar, búsitandi uttanlands, ið eru heima, plaga at vera trúgvir gestir á hesum tiltøkunum. Og sjálvandi eisini onnur, ið bara hava áhuga fyri føroyskum dansi.

Í smaband við Listastevnuna, sum verður í august, veru eisini skipað fyri eini slíkari dansinátt.

Tað er eisini afturvendandi tiltak. Men tað tiltakið plagar at flyta millum ymsu dansifeløgini í landinum, siga tey, í Sláið Ring.